

## Býráðsformaðurin setir stevnuna

Norðoyastevnan verður alment sett fríggjakvøldið. Klokkan 18.30 fer skrúðgonga frá økinum niðanfyri Býráðshúsini í Klaksvík. Klaksvíkar Hornorkestur gongur á odda fyri skrúðgonguni, sum endar á parkeringsøkinum við KÍ-høllina.

Klokkan 19.00 fara limir í Klaksvíkar býráð at takast við starvsfelagar í Nes, Runavíkar og Gøtu kommunu á fótbóltsvøllinum. Í hálvleikinum fer Jógvan við Keldu, býráðsformaður í Klaksvík at seta norðoyastevnuna, og í tí sambandinum fer hornorkestrið eisini at spæla.

# Kular Røtur eru vell

Fríggjadagin kemur nýggj fløga við Kulum Rótum, og sama dag verður stór konsert í KÍ-høllini, har eisini tann tiltikni Trølla-Pætur verður við



MYND: JENS KRISTIAN VANG

**Arnfríð Lützen er ein av sangarunum í Kulum Rótum, og fríggjakvøldið syngur hon á stóru konsertini í KÍ-høllini**

*Eyðun Klakstein*

Kul, kulari, kulast.

Kular Røtur hava fingið vind í seglini, og fríggjadagin kemur nýggj fløga við 11 spildurnýggjum sangum frá teimum kulu.

Sama kvøld verður stór konsert í KÍ-høllini, har allir teir kendur sangirnir frá fyrru fløguni, umframt nýggir sangir, verða at hoyra.

Steintór Rasmussen er maðurin aftanfyri tær kulu røturnar, og hann er spentur til tiltakið á norðoyastevnu.

- Vit ætla at gera nógv burtur úr, og fólk skulu vera vís í, st tey fáa gott undirhald fyri alla familjuna, sigur hann.

Á konsertin verður tann nógv umrøddi Trøllapætur eisini við. Stórskíggi verður settur upp og har verður myndashow við tekninginum, sum Jógvan á Høvdanum hevur gjørt. Dansigentur fara at hava eitt show, og annað undirhald verður eisini.

### FLØGAN FÆST Á STEVNUNI

Eitt avmarkað upplag av nýggju fløguni við Kulum Rótum verður flogið til Føroya fríggjadagin, og tí verður tað gjørligt at fáa hendur á nýggju sangunum hjá Kulum Rótum um stevnuna.

Sangirnir á fløguni eru upptiknir í Studio Pegasus í Klaksvík frá februar til mai, og ljóðblandingin er eisini gjørd í studionum í Klasvík. Fyri tveimum vikum síðani fór fløgan til Danmarkar, har seinasta hond varð løgd á, áðrenn hon fór til framleiðslu.

Steintór Rasmussen hevur gjørt flestu yrkingarnar, og hann og In-G hava gjørt løgini. Okkurt traditionelt lag hevur tó sníkt seg uppí. In-G hevur framleitt tónleikin, og hann hevur eisini spælt nógv av ljóðførunum. Tónleikarar sum Erik Biskopstø, Eyðun Nolsøe og Mikkjal Hvannastein hava eisini ein fingur við í spælinum.

Tónleikurin er modernaður, og hesaferð er meira talan um eina barna- og ungdómsfløgu.

- Tað ber illa til at siga, um tann nýggja fløgan er betri enn tann fyrra. Tað er sum við børnum. Tað ber ikki til at siga, um eitt barn hjá tær er betri enn annað. Tey eru ymisk, sigur Steintór Rasmussen.

### SOMU FÓLK SYNGJA

Fólkini, sum syngja á nýggju fløguni, eru tey somu, sum á tí fyrru. Jógvan Hansen og Arnfríð Lütsen hava framvegis týðandi leikut, men eisini systur Arnfríð, tann 12 ára gamla Rannvá, syngur á fleiri sangum. Og so er 11 ára gamli Brandur Enni av Tvøroyri eisini sangari á fløguni.

Tann fyrra fløgan við Kulum Rótum kom út stutt undan jólum í fjør, og hóat hon var í harðari kapping við fleiri góðar barnafløgur, hevur hon higartil selt út ímóti 2000 eintøkum, og nú á døgum eru tað heilt fáar føroyskar útgávur, sum kunnu reypa sær av slíkum sølutølum.

Sjónbandið við Kulum Rótum gekk eisini avbera væl, og í løtuni er ætlanin at koma við einum nýggjum sjónbandi í heyst.

- Vit æltaðu at geva eitt sjónband út nú, men vit hildu ikki, at hetta er rætta árstíðin til eitt sjónband. Tí hava vit valt at bíða við hesum til í heyst, sigur Steintór Rasmussen.

Nýggja sjónbandið verður verður gjørt sum ein teknifilmur, har sangir á fyrru og seinnu fløguni eru grundarlagið undir tekningunum.

- Hvussu verður við Kulum Rótum framyvir veldst sjálvandi um undirtøkuna fyri nýggju fløguni og konsertunum, sum vit fara at hava í summar, men tað liggur í kortunum, at ein triðja fløga kemur seinni. Tá ætla vit, at børn skulu sleppa at skriva yrkingar til útgávuna, sigur Steintór Rasmussen.

Men á Norðoyastevnu verður tað tann næsta útgávum við Kulum Rótum, sum fer at runga, og á konsertini fríggjakvøldið verða eisini allir teir kendur sangirnir frá fyrru útgávuni at hoyra.

# Børn og vaksin kapprenna

Fjórða árið á rað verður skipað fyri Føroya Bjór renning á norðoyastevnu. Renningini hevur fingið fast pláss í skránni leygardag, og í ár verður lagt til brots á middegi.

Bólkarnir eru tríggir í tali. Fyrst renna tey, sum eru undir skúlaaldur. Síðandi tey upp til 12 ár og síðst renna tey frá 13 árum og eldri. Harafturat verður ein serlig firmastafett, har tríggir luttakarar renna saman.

Ítróttarfelagið Treysti skipar fyri kappingini, og sagt verður, at tey, sum ætla sær at verða við í kappingunum, skulu melda til í seinasta lagi 20 minuttir áðrenn kappingarnar byrja. Treysti mælir fólki til at tekna seg til í góðari tíð.

Tilmeldingin fer fram við Telefonstøðina, har byrjan og mál eisini eru. Runnið verður eftir Skúlagøtu, Gerðagøtu og Biskupsstøðgøtu.

**ek**



## Sumbingar eru fótbóltsgestir

Nógvur ítróttur er á norðoyastevnu, og saman við FM-kappróðrinum leygardagin er 1. deildardysturin í fótbólti stóru ítróttarhendingarnar.

Sumbingar vitja í Klaksvík, og landskappingardysturin móti KÍ verður spældur sunnudagin klokkan 15.00.

Øll liðini hjá KÍ spæla á heimavølli um stevnuna. 1. kvinnulið spælir móti B71 sunnudagin klokkan 18.00. 2. deildarliðið við monnum spælir móti HB leygardagin klokkan 18.00, og 3. deildarliðið spælir sunnudagin klokkan 12.30 ímóti TB.

# Klaksvíkingum leingist eftir einum vinnarabáti

Teir vóna, at úrslitini í ár fara at vera so mikið góð, at hugurin at rógva aftur fer at kveikjast millum tey heilt ungu



MYND: NORÐLÝSIÐ

**Klaksvíkingur venur til norðoyastevnuna**

*Jóannes Hansen*

Kappróðurin í Klaksvík og Norðoyggjum sum heild hevur í mong ár verið í einum aldudali. Árnfirðingurin, hevur ikki verið flotaður í mong ár, og tað er langt síðani, at nakað sást til bátarnar hjá teimum í Hvannasundi og Norðdepli – 10–mannafarið Norðing og 5–mannafarið Rituna.

Í Klaksvík hava teir roynt at verið við, men tað hevur gingið striltið. Teir eiga 5–mannafar, 6–mannafar, 8–mannafar og 10–mannafar. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað hevði borið til at tikið lut við seks manningum. Men tað er langt síðani, at klaksvíkingar hava havt so nógvar manningar í FM kappingini.

### ROYNDIRNAR TELJA

Í ár sær tað eitt sindur hugaligari út. 8–mannafarið, Nevið Reyða, er mannað, og kvinnurnar hava vant nógv við 6–mannafarinum, Páll Fanga.

Umborð á báðum bátunum eru so at siga bara fólk, sum áður hava roynt seg í kappróðri.

Nevið Reyða luttók í bygdastevnuni á Skála, men har royndist tað illa. Sjey 8–mannafør kappaðust, og báturin hjá klaksvíkingum endaði aftastur:

– Tá sóu vit, hvussu stóran týdning royndirnar hava. Sammett við undir venjing róðu vit út av lagi illa, og báturin gekk als ikki, sum vit vanliga fáa hann at ganga.

Hetta sigur Sigfríður Venned. Hann er ein av teimum umborð á Nevinum Reyða. Hann hevur verið í nevndini í kappróðrarfelagnum í Klaksvík. Nú hann er farin at rógva, hevur hann tikið seg úr nevndini, men hann er framvegis við í felags arbeiðnum. Elias Zachariasen er formaður í Klaksvíkar Róðrarfelag, Kristian Eli Zachariasen er næstformaður, og hini í nevndini eru Fróði Waag, Martin Venned og Beinta Klakkstein.

– Vit fóru í bátin fyrstu ferð eina viku undan flaggdegnum. Síðani 25. apríl hava vit vant eftir miðvísari ætlan. Vit eru í bátinum hálvan annan tíma hvørja ferð, og eg haldi, at tað hevur gingið væl. Hvussu úrslitið verður á norðoyastevnu veldst m. a. um nervarnar, heldur Sigfríður Venned.

Martin Venned hevur tey bæði seinastu árini verið partur av góðu manningini umborð á Eysturoyingi. Nú býr hann í Klaksvík, og har hevur hann lagt venjingina hjá 8–mannafarinum til rættis.

### MORGUNVENJING

Seinnapartin av áttati árunum var Páll Fangi ofta fremstur í kvinnukappingini. Onkuntíð síðani hevur glógvað í, men nú eru fleiri ár síðani, at kvinnurnar í Klaksvík gjørdu um seg.

Í ár er báturin mannaður við kvinnum, sum so at siga allar áður hava róð kapp. Merkisvert hevur tað verið, at 6–mannafarið hevur verið at sæð heilt tíðliga á morgni. Hetta kemst av, at viðhvørt hava fleiri av rógvarunum arbeitt í kvøldvakt, og so hava tær vant áðrenn vanliga arbeiðstíð.

Páll Fangi er ikki mannaður við monnum. Klaksvíkingurin er mannaður, men teir hava bara vant í heilt stutta tíð.

Í ár eru tað 30 ár síðani, at 10–mannafarið hjá klaksvíkingum síðst kom fyrstur á mál. Í 1970 fingu teir nýggjan Klaksvíking. Teir vunnu tríggjar róðrar, m. a. á norðoyastevnu.

### NÝTT 5–MANNAFAR

Tíðliga í seksti árunum var áhugin fyri kappróðri stórur í Klaksvík. 10–mannafarið var væl við í kappingini, og bæði dreingirnir og genturnar umborð á Fípuni Føgru settu dám á kappingarnar.

Seinnu árini hevur tað verið meiri soltið. Dreingirnir vunnu á jóansøku í 1989. Í níti árunum hevur millum lítið og einki verið at hoyrt og sæð til klaksvíksdreingir í kappróðri. Hjá gentunum hevur vitað betri við. Í fjør royndust tær so mikið væl, at tær vunnu triðja plássið og harvið bronsukrónurnar í FM kappingini.

Fípan Fagra er aftur í ár manna við gentum. Sammett við í fjør eru tvær nýggjar komnar umborð. Genturnar eru ikki so vísar í, hvussu tað fer at hilnast, tí tær hava ikki vant so leingi, sum tær høvdu ætlað sær.

– Vit droyma um, at kappróðurin í Klaksvík aftur skal koma fyri seg. Um dreymurin skal gerast til veruleika, so er neyðugt, at vit fáa tey ungu uppí, og kanska er ein glotti at hóma. Onkrir skúlaflokkar eru farnir at rógva í fimleikatímunum, og teimum dáma væl. Í felagnum verður tosað um at fáa eitt nýtt 5–mannafar. Tað vísir seg, at tað eru nýggju bátarnir, sum vinna. Høvdu vit fingið eina góða manning umborð á eitt nýtt 5–mannafar, so hevði tað ivaleyst verið sera týdningarmikið fyri áhugan fyri kappróðri her í Klaksvík, heldur Sigfríður Venned.